# Fundarskrá hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 27. november 2018, kl. $19^{00}$

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Eyðun Hansen, Ingi Olsen, Laila Haldansen, John Zachariassen, Herit Magnussen og Durita á Heygum
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 110**
Tilmæli frá fíggjarnevndini um uppskot til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2018.
J.nr. 30102-1-2017

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 22. november 2018 uppskot til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2018.

Nevndin samtykti at leggja uppskot til endurskoðaða fíggjarætlan Vestmanna Kommunu fyri 2018 fyri bygdarráðið til 1. viðgerð.

**Viðv. 110**
Uppskot til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2018 varð lagt fram til 1. viðgerð.

**Mál 111**
Tilmæli frá fíggjarnevndini um uppskot til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2019
J.nr. 30102-2-2018

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 22. november 2018 uppskot til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2019.

Nevndin samtykti at leggja uppskotið til fíggjarætlanina fyri Vestmanna Kommunu fyri 2019 fyri bygdarráðið til 2. viðgerð. Í uppskotinum er roknað við, at barnafrádrátturin verður óbroyttur
kr. 5.000, at kommunuskattaprocentið verður óbroytt 21,5% og at gjaldið fyri barnaansing verður óbroytt.

**Viðv. 111**
Uppskotið til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2019 var einmælt samtykt við 2. viðgerð.

**Mál 112**
Tilmæli frá fíggjarnevndini um umsókn frá norðurlendska leiksamstarvinum Tvazz um stuðul til sjónleikaframførslu í Vestmanna.
J.nr. 2000002-1-2018

Fíggjarnevndin hjá Vestmanna Bygdarráðið viðgjørdi á fundi tann 22. november 2018 umsókn frá norðurlendska leiksamstarvinum Tvazz um stuðul til sjónleikaframførslu í Vestmanna.
Tvazz søkir um stuðul til at koma til Vestmanna í 2019 at framføra klassikaran Deyðadansurin. Søkt verður um kr. 10.000 í stuðli umframt lán av hølum.

Nevndin mælir til at ganga umsóknini um stuðul á møti og at játta stuðulin av kontuni til mentanarlig tiltøk á fíggjarætlanini fyri 2019.

**Viðv. 112**
Tilmælið var einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.30

Sign.:

Pauli T. Petersen Ingi Olsen Eyðun Hansen

John Zachariassen Laila Haldansen Herit Magnussen Durita á Heygum